# Eilif Arge Gávubúð

## – tann rætta gávan




Tað er ivaleyst trupult hjá teimum flestu at finna røttu gávuna til ein, tey veruliga vilja gleða.

Ofta eru gávubúðir ógvuliga feminimar, einki ringt um tað, men har kann tað vera trupult at finna eina gávu til mannin, sonin ella sjeikin.

Í gávubúðini hjá Eilif Arge í Klaksvík kanst tú skjóta í mál hvørja ferð, tí her finnur tú gávur til mannfólk og konufólk. Úrvalið er breitt, umframt gávur úr silvuri og gulli, stáli og glasi, so fært tú eisini sett eina gávu saman burtur úr leskiligum kaffi og tilhoyri. Tí hjá Eilif Arge fært tú nemliga eisini serligt kaffi í allar bestu góðsku.



Fyritøkan hevur eitt sera breitt úrval av kaffibønum, ið eru serliga útvaldar av einum norskum samstarvfelaga 'Black Cat Kaffe og Tehus'.

Øll sløgini eru vistfrøðilig og eru heystað á burðardyggan hátt, so kemur tú á LIVA leygardagin, hevur tú møguleika til at smakka tey ymisku sløgini av kaffi. Hvør veit, kanska tú eisini finnur tín favorit - sigur Magnus Arge, stjóri á Eilif Arge Gávubúð.

Umframt serstakt kaffi bjóðar Eilif Arge eisini alt tilhoyr, so sum espressokannur, stemilkannur, kvarnir, kaffigløs í fleiri støddum. Tað er enntá møguligt at fáa kaffi sirup frá '1883 Philibert Routin', umframt mangt annað gott.

